# Bátahyljar eru umhvørvisbumbur

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*

Norsk bløð skriva, at kanningar, sum gjørdar eru av smábátahavnum ella báta_hyljum í Noregi, vísa, at hesir eru "reinar" umhvørvisbumbur, sum bløðini rópa tað.

Serkøn á økinum hava ávarað fólk ímóti at skola fisk í bátahyljunum, tí vandi er fyri, at fiskurin verður dálkaður.

Ávaringarnar í Noregi koma eftir, at kanningar eru gjørdar av seks tilvildarliga útvaldum bátahavnum og bátahyljum.

Úrslitið er sannførandi.

Verkfrøðingurin, Grete Haugan, sigur við Bergens Tidende, at allar bátahavnirnar, sum vóru við í kanningini, vóru munandi dálkaðar.

– Eitt nú er stórar nøgdir av eituri funnar, sum stava frá botnmálingini á bátum, evnir úr tjøru og ymisk tungmetall, sigur verkfrøðingurin.

Í Noregi rokna tey við, at dálkingin í tilvildarliga útvaldu bátahyljunum ikki er eindømi, men sæst aftur um alt landið.

Frammanundan hava tvær kanningar aðrastaðni í landinum víst somu úrslit.

### Hjá okkum?

Nú eru vit føroyingar kanska ikki so óførir at kanna leyst og fast, og neyvan eru vit enn so bevíst umhvørvisliga, sum ynskiligt hevði verið.

Tað eru jú hini, sum dálka – og ikki vit, hava vit kanska lyndi at halda.

Áhugavert hevði tó verið at kannað bátahyljar í Føroyum fyri dálkingarvandar, sum møguliga kunnu vera til bága fyri fólk og fæ, hóast Noreg hevur djúpri firðir enn vit.

Í greinini um bátahavnir sum umhvørvisbumbur í Noregi, stendur einki um, hvussu hesar havnir liggja - um tær liggja inni á firðunum ella við streymasjógv.



*Í Noregi vísa kanningar, at bátahavnir og bátahyljar kring landið eru "reinar" umhvørvisbumbur, tí dálkingin er so stór. Veit nakar, hvussu vorðið er við bátahyljunum hjá okkum?*
*Mynd (tilvildarlig): Vilmund Jacobsen*

# Ferðafólk vaða í ótespiligum fiskavatni

**Rúna Sivertsen, sum er á tingi fyri Jógvan við Keldu, vil hava reglur settar í gildi fyri flutningi av feskum fiski millum oyggjarnar, soleiðis at frárensluvatn ikki rennur úr bilunum og niður á dekkið – til ampa fyri ferðafólk og manning.**

FISKAFLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*



*- Frárensluvatn frá fiskabilum dálkar illa, og tá ið tað javnan kemur fyri, at nærum alt dekkið flýtur í hesum ótespiliga vatni, er roykurin ramur um skipið. Hetta er til ampa fyri bæði ferðafólk og manning, sigur Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, sum vil hava landsstýrismannin at gera nakað við málið sum skjótast.*

Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, fer at seta Eyðuni Eltør, landsstýrismanni, ein munnligan fyrispurning um flutning av feskum fiski.

Løgtingskvinnan spyr, nær tað verður eitt krav, at frárensluvatn frá flutningsakførum, sum flyta feskan fisk millum oyggjarnar, ikki longur má leka úr hesum akførunum?

Í viðmerkingum sínum, vísir Rúna á, at reglurnar fyri flutningi av alifiski eru strangari enn fyri flutning av fiski annars.

– Í reglunum um alifisk, verður kravt, at alt frárensluvatn verður uppsamlað í tangar og seinni sóttreinsað vegna smittuvanda.

Løgtingskvinnan sigur, at í kunngerð um flutning av fiski annars er bert galdandi, at "flutningsbilar til flutning av fiski, fiskavøru, ísi ella salti skulu vera lokaðir".

Kravið um lokan forðar tó ikki fyri, at frárensluvatn kann renna frá bilunum.

Á hinari síðuni er tað út frá einum heilsufrøðiligum sjónarmiði eitt krav, at bræðingarvatn og onnur væta frítt kann renna frá.

– Tað er tó ógvuliga óheppið, tá ið frárensluvatnið rennur niður á dekkið á ferjunum, har ferðafólk eisini eru, tí hetta er til stóran ampa fyri bæði ferðafólk og manning.

Rúna vísir á, at fiskavatnið dálkar illa, og tá ið tað javnan kemur fyri, at nærum alt dekkið flýtur í hesum vatni frá fiskabilum, er roykurin ramur um skipið.

– Tá ið vit sum føroyingar mangan halda støðuna vera ótespiliga, er ikki ilt at gita sær, hvat útlendingar, sum ferðast millum oyggjarnar við strandfaraskipunum, munnu hugsa um skilið, sigur hon.

### Lóg ella kunngerð

Í viðmerkingum sínum minnir løgtingskvinnan eisini á lýsing frá landslæknanum, har hesin sigur, at fiskur og slakt frá seyði mugu haldast atskild, tí fiskur kann bera botulismubakteriuna við sær.

– Tí er neyðugt, at tiltøk verða sett í verk sum kunnu forða fyri, at ótespiliga og ikki smittuleysa fiskavætan verður borin í land.

Hon vísir á, at Strandfaraskip Landsins hava flutningsakfør til fiskaflutning, har frárensluvatn verður uppsamlað, men meginparturin av fiskinum verður ikki fluttur við hesum bilum.

Rúna heldur, at tá ið alivinnan megnar at lúka ásettu krøvini um vatntættar bilar, hevði óivað verið møguligt hjá fiskivinnuni at lokið somu krøv.

– Men so leingi, hetta ikki er eitt krav, verður støðan neyvan broytt.

Hon heldur, tað hevði verið ynskiligt at fingið reglar um uppsamling av frárensluvatni frá fiskabilum, antin við lóg, kunngerð ella sum eitt krav frá Strandfaraskipum Landsins.

– Strandferðslan hevur reglar umborð á skipunum, sum ferðafólk og bilførarar mugu lúka. Tí mátti tað ikki verið ómøguligt at sett krøv til flutningsakfør um, at frárensluvatn ikki má renna niður á dekkið.

At enda vónar Rúna Sivertsen, at landsstýrismaðurin skilir trupulleikan og ger nakað við málið sum skjótast.



# Gullaksavertíðin er av á hesum sinni



*Polarhav og Stjørnan hava lagt meginpartin av gullaksaveiðini upp til Tavuna í Leirvík í vertíðini, sum byrjaði síðst í apríl og endaði síðst í september. Eysturbúgvin og Vesturbúgvin hava eisini verið á gullaksaveiði seinastu mánaðirnar*

**Á Tavuni í Leirvík , sum fekk 1200 tons minni av gullaksi í ár enn í fjør, virka tey nú upsa til portiónir**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tey fýra skipini, sum hava fiskað gullaks í ár, Stjørnan og Polarhav og Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, eru givin við fiskiskapinum á hesum sinni.

Sum skilst, hevur fiskiskapurin hjá bátunum verið á leið tann sami, sum undanfarin ár.

Tað var áTavuni í Leirvík, at gullaksaævintýrið veruliga byrjaði, men í ár hava trý virki keypt gullaks frá skipunum. Umframt Tavuna, eru tey Fiskavirking í Miðvági og Kollafjord Pelagic. Í Miðvági hevur framleiðslan verið hin sama sum á Tavuni, nevniliga fars, men í Kollafirði er fiskurin vorðin heilfrystur.

### Færri tons

Kári Egholm Jacobsen, virkisleiðari á Tavuni, sigur, at virkið hevur keypt 6.000 tons av gullaksi í ár. Tað eru góð 1200 tons færri enn seinasta ár.

- Eg trúgvi, at skipini hava fiskað nøkulunda tað sama í ár sum í fjør, men tey góvust nakað fyrr.

Hann sigur, at tey byrjaðu at arbeiða gullaks á Tavuni, 30. apríl í ár, og 25. september hevði virkið seinastu landingina.

- Í fjør arbeiddu vit gullaks út um hálvan oktober, sigur Kári.

Polarhav og Stjørnan, sum burtur av hava landað til Tavuna, byrjaðu á gullaksinum einar tveir túrar fyrr enn Eysturbúgvin og Vesturbúgvin.

Kári sigur, at meðan fiskurin hjá leirvíksbátunum verður ísaður í kørum, verða hann køldur í tangum umborð á hinum báðum bátunum.

### "Køkan" minni

Spurdur, hvat hann heldur um kappingina um gulllaksin, nú tríggir keyparar hava verið í vertíðini , sigur virkisleiðarin, at hetta hevur verið ein avbjóðing fyri Tavuna.

- Her ræður um at vera við í kappingini um fiskin, men tað er greitt, at tá ið bátatalið er avmarkað til fýra, verður "køkan" at býta minni, hóast samlaða veiðinøgdin er hin sama, sigur hann.

Sum skilst, er nøgdirnar, sum lagdar eru upp í Kollafirði, ikki tær heilt stóru, men í Miðvági hevur virkið keypt góð 2.000 tons.

Kári sigur, at marknaðarlondini til gullaksafars í fyrsta lagi eru Noreg, Svøríki og Ongland. Ein lítil partur av framleiðsluni fer til Danmarkar.

### Meirvirka upsa

Nú gullaksavertíðin er av á hesum sinni, eru tey eins og undanfarin ár farin at keypa og arbeiða upsa áTavuni.

- Vit gera bara lidnar upsaportiónir. Tað einasta, sum fer til fars, er tað, sum verður skorið burtur av fiskinum. Á Tavuni er eingin linja til blokkframleiðslu.

Kári sigur, at nú tey arbeiða upsa, verður arbeitt við tveimum vaktum. Tann fyrra er til arbeiðis frá kl. 8-16 og tann seinna frá kl. 16 til midnátt. 30-35 fólk eru á hvørji vaktini. Á gullaksinum vóru 17 fólk á hvørjari vakt, men her arbeiða tey vanliga við trimum vaktum, tá ið nógv er at gera.

Í Sosialinum í gjár, segði virkisleiðarin, at Tavuni vantar 16 góðar reinskerarar. So, er onkur, sum dugir at arbeiða fisk og einki hevur at takast við, er bara at venda sær til virkið í Leirvík.

Kári Egholm Jacobsen segði eisini, at fær virkið ikki fleiri reinskerarar, kann tað gerast neyðugt at gevast við tí eini vaktini.

# Útlendska arbeiðsmegin eingin trupulleiki

**- FA sær ongan vanda við útlendsku arbeiðsmegini í Føroyum beint nú, men verður talan um eina "invasjón" av fremmandari arbeiðsmegi, fara vit sjálvandi at taka spurningin upp, sigur Georg F. Hansen, næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag**

ARBEIÐS-MARKNAÐURIN
*Vilmund Jacobsen*



Føroya Arbeiðarafelag letur seg ikki órógva av, at ein lítil partur av teimum, sum starvast innan føroysku fiskaframleiðsluna, eru útlendingar, sum hava fingið arbeiðsloyvi í Føroyum.

- Vit halda ikki, at hetta er nakar trupulleiki í løtuni og hava tí heldur ikki viðgjørt henda spurningin sum ein møguligan trupulleika.

Hetta sigur næstformaðurin í Føroya Arbeiðarafelag, Georg F. Hansen, nú Ingeborg Vinther er burturstødd.

Hann sigur, at nøkur av teimum, sum arbeiða í fiskaframleiðsluni kring landið, eru útlendingar, sum eru í Føroyum ein part av árinum í samband við ítrótt.

- Tá ið so ítrótturin er liðugur, fara flestu heimaftur.

Georg veit eisini um, at aðrar útlendingar eru her heima og arbeiða, men hann heldur ikki, at hetta er nakar trupulleiki í løtuni.

### Fylgja gongdini

- Vit eru fegin um, at nógv arbeiði er í landinum, og vit hava ongan áhuga í at gera tað trupult hjá arbeiðsgevarunum við at sýta teimum útlendska arbeiðsmegi, um tað er neyðugt fyri at hava arbeiði gangandi. Vit krevja, at sáttmálaviðurskiftini eru í lagi, og hesin parturin verður fylgdur upp við tí samstarvi, vit hava við limafeløgini hjá FA.

Næstformaðurin sigur, at honum kunnugt, eru eingin slíkir trupulleikar í løtuni.

Spurdur, um hann heldur, at útlendska arbeiðsmegin kann gerast ein hóttan, um nógv fleiri fólk koma higar at arbeiða, sigur hann.

- Tað er trupult hjá mær at siga nakað um beint nú, tí vit hava ikki viðgjørt handa spurningin sum ein trupulleika. Men tað er greitt, at verður talan um eina "invasjón" av útlendskari arbeiðsmegi, fara vit sjálvandi at taka málið upp í Føroya Arbeiðarafelag, sigur Georg F. Hansen.